Roknskapargreining

Gjøgnumgongd av útvaldum roknskapartølum hjá 20 av teimum stóru fyritøkunum í Føroyum

januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Um greiningina

Roknskapartøl fyri árini	Viðkomandi lyklatøl
2017 - 2021	Nettosøla EBIT Margin EBIT Íløgur Nettoskuld

Um greiningina

Greiningin er gjørd við støði í almennu roknskapunum hjá nøkrum av teimum størstu fyritøkunum í Føroyum. Hetta er fimta greining av sínum slag frá P/F Januar.

Tey feløgini, ið eru við í greiningini, eru feløg, sum hava ein roknskap í flokki C-stór ella størri. Hetta er ein broyting í mun til undanfarin ár, og hevur hetta eisini viðført størri útskiftingar í teimum feløgunum, sum eru við í greiningini.

Tey 20 feløgini ið eru við í ársins greining, síggjast á myndlinum.

Lýsing av greiningini

Broytingar frá undanfarnu greiningum

P/F Januar hevur seinastu árini gjørt roknskapargreiningar undir heitinum *20 av teimum størstu*, og hetta er fimta greiningin í røðini. Hóast greiningarnar eru broyttar nakað ár um ár, so eru tað í ár so mikið stórar broytingar, at vit ynskja at geva eina stutta lýsing av hesum.

Tann størsta broytingin, ið hevur týðandi avleiðingar fyri sambæri av hesari greining í mun til greininginum undanfarin ár, er at vit í ár hava valgt at hyggja eftir fyritøkum, ið hava ein roknskap eftir roknskaparflokkinum C-stórar og størri. Undanfarin ár, hevur greiningin tikið støðið frá nettosølu einans, har C-stórar fyritøkur eru stórar í nettosølu, fíggjarjavna og starvsfólkum. Hetta hevur viðført størri broytingar í sambandi við val av fyritøkum.

Bakkafrost

Bakkafrost verður mett at vera so mikið stórt í mun til hini feløgini, at hetta felagið skeiklar tølini, og tískil er Bakkafrost ikki tikið við í greiningina.

Val frá roknskaparklassa

Vit hava broytt greiningina, tí nú er møguligt at heinta roknskapar tøl frá skrásetingini umvegis XBRL. Tað er tí meira einfalt at fáa ein lista yvir føroyskar fyritøkur ið hava ein roknskap í roknskapar-flokki C-stór ella størri.

Avmarkingar

Fíggjarfeløg, íroknað peninga-stovnar, íløgufeløg, eftirlønar-feløg, tryggingarfeløg o.l. eru ikki tikin við í greiningina.

Samandráttur av broyting í lyklatølunum frá 2020 til 2021

Nettosølan er økt 12,8% í mun til undanfarna ár, EBIT-marginan er eisini økt, tó ikki eins nógv 2,9%. Íløgurnar eru minkaðar við 6,6%. Nettoskuldin er voksin við 7,8%.

Nettosøla

Nettosølan er nógv økt aftur, og er nú á einum hægri støði enn áðrenn Covid-19. Heili 6 av teimum 20 valdu feløgunum hava havt eina øking í nettosøluni, ið er meira enn 20%. Meðalvøkstur (vektað pr. felag) er 11,0% (2020: -6,3%) ímeðan samlaði vøksturin er 12,8% (2020: -8,5%).

EBIT

EBIT marginan hækkar við 2,9%, men er tó enn eitt vet lægri, enn tað varð í 2019. EBIT marginan hevur annars verið støðugt lækkandi tey seinnu árini, men hækkar nú aftur, eftir eitt stórt fall í 2020. 10 av teimum 20 feløgunum hava eina hækking í EBIT, tó hevur gongdin verið negativ hesi seinastu 5 árini, við undantaki av 2021.

Íløgur

Íløgurnar hjá teimum størru feløgunum eru minkaðar við 6,6% samanhildið við seinasta ár, og hava íløgurnar verið støðugt fallandi seinastu 4 árini.

Nettoskuld

Nettoskuldin hjá teimum stóru feløgunum er økt við 7,8% í 2021 (2020: 4,1%). Nettoskuldin hevur verið í einum støðugum vøkstri seinastu 5 árini. Verða feløgini vektað eins, so hækkar nettoskuldin 11,8% í meðal pr. felag (2020: 8,2%)

Nettosølan
+12,8%

EBIT
+2,9%

Íløgur
-6,6%

Nettoskuld
+7,8%

Lyklatøl

Gongdin í lyklatølinum frá 2017 til 2021

P/F Januar hevur síðani 2017 gjørt roknskapargreiningar av 20 teimum størstu fyritøkunum í landinum. Greiningin er broytt nakað gjøgnum árini, sum lýst í *Lýsing av greiningini*. Øll tøl í talvuni niðanfyri eru frá teimum 20 fyritøkunum ið eru valdar til hesa kanning.

Í talvuni niðanfyri síggjast broytingarnar í nøkrum útvaldum lyklatølum frá 2017 til 2021.

Talvan vísur broytingina ár til ár.

	Eind	2021	2020	2019	2018	2017
Lyklatøl						
Broyting í nettosøla	%	**12,8**	-8,5	7,6	4,3	I/R
Nettosøla	mia.kr.	**11,3**	10,0	10,9	10,2	9,7
Broyting í nettosølu	Index (2017 = 100)	**116**	103	112	104	100
EBIT - margina	%	**9,0**	6,1	10	10,5	13
Íløgur	mia.kr	**1,2**	1,4	1,5	1,6	1,4
Rentuberandi skuld	mia.kr	**5,3**	4,9	4,7	4,6	4,4
Eginognarpartur	%	**49,5**	51,2	52,6	48,8	46,6
Ársverk	tal	**3.708**	3.609	3.577	3.375	3.142
Umsetningur pr. ársverk	mió.kr	**3,4**	4,0	3,9	3,9	4,0
Ársúrslit	mió.kr.	**829**	399	899	892	1.033
Vinningsbýti	mió.kr.	**404**	194	220	364	180

Stór øking í nettosøluni í 2021

Einstakar fyritøkur hava størri ávirkan á nettosøluna samanborið við aðrar. Fimm av stóru fyritøkunum standa fyri 43% av samlaðu nettsøluni. Avleiðingin frá Covid-19 hevur verið eyðsýnd í 2020, men tann lækkingin, ið var í nettosøluni tá er tikin innaftur, og er nettosølan nú hægri, enn hvat hon var áðrenn Covid-19.

Samlaða nettosølan hækkaði við 12,8% í mun til undanfarna ár (2020: -8,5%), ið er ein øking upp á 1,3 mia.kr.

Tann samlaða nettosølan fyri 2021 er 11,3 mia.kr. (2020: 10,0 mia.kr.).



Bæði Atlantic Airways og Smyril-Line høvdu stóran vøkstur frá 2020 til 2021. Og væntandi koma hesar fyritøkur framhaldandi at hava stóran vøkstur frá 2021 til 2022, tá ferðavinnan hevur fingið vind í seglini aftur.

Luftalsliga ávirkanin á samlaða vøksturin frá 2020 til 2021

Samlaði vøksturin í 2021, á 12,8% svarar til 1,3 mia.kr. Vit hava greinað hvussu prosentvísi parturin av hesum vøkstrinum er fordeildur millum feløgini.

Foss diagrammi niðanfyri visir at 8 feløg høvdu eina positiva ávirkan á vøksturin í ein minni mun (minni enn 6%). Tvey av feløgunum høvdu positiva ávirkan á samlaða vøksturin í ein miðal mun (6 – 12 %). 5 fyritøkur ávirka í ein størri mun (meir enn 12% vøkstur) og hava somuleiðis stóra ávirkan á vøksturin í nettosølu.

4 fyritøkur ávirka samlaða vøksturin negativt, tí at nettosølan hjá hesum fyritøkum er lægri í 2021 enn í 2020.



Rakstraravkastið frá fyritøkunum er aftur hækkandi

EBIT-margin er hækkað til 9% í 2021, í mun til 6,1% í 2020. Sæð yvir eitt 5 ára tíðarskeið er gongdin tó niðurgangandi.



Gongdin í EBIT-margin og nettosølu

Tá vit samanbera broytingina í EBIT-margin við gongdina í nettosøluni hjá fyritøkunum, síggja vit, at 9 fyritøkur bæði hava økt um nettosøluna, samstundis sum EBIT-margin eisini er økt. 7 av fyritøkunum hava økt um nettosøluna, men EBIT-margin er lækkað.

Tvey av feløgunum hava havt bæði fallandi nettosølu og fallandi EBIT-margin. Hetta merkir, at fyritøkan bæði hevur selt minni, umframt, at hon hevur tjent minni upp á tær vørur/tænastur, ið fyritøkan hevur selt.

Samlað er nettosølan økt í mun til 2019, men samlaða rakstraravkastið er lægri, enn hvat tað var í 2019.





-6,6%

Íløgurnar eru lækkaðar samanhildið við undanfarna ár.

Fyritøkurnar í greiningini hava verið afturhildnar við íløgum seinasta árið samanborið við undanfarin ár.

Stórt fall í íløgunum

Tær stóru fyritøkurnar hava brúkt knappar 1,3 mia.kr. í íløgum í 2021, hetta eru lægstu íløgurnar, ið hava verið hetta seinasta 5 ára tíðarskeiðið.

Tó hava 12 av 20 fyritøkum gjørt størri íløgur í 2021 samanhildið við undanfarna ár (2020: 11 feløg).





Netto rentuberandi skuld økt við 7,8%

Samlaða nettoskuldin hjá fyritøkunum er økt við 7,8%. Verða feløgini vektað eins, er talan um ein vøkstur í nettoskuldini upp á 11,8%.

Samanlagt er talan um øking í skuld upp á tils. 382,5 mió.kr.





Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Set tykkum í samband við okkum og fá eitt innleiðandi og óheft prát um tit hava avbjóðingar ella ivamál ið tit ynskja hjálp við. Vit hava serfrøðingar innan fleiri øki:

- Grannskoðan
- Roknskap
- Skatt
- KT- Trygd
- Fíggjarviðurskifti
- Leiðsluviðurskifti
- Verkætlanarleiðslu

Kristian Vágsheyg Kruse
Ráðgevi

T: +298 551722
E: kk@januar.fo

Hanus á Bøgarði
Ráðgevi

T: +298 551737
E: hab@januar.fo

Fyrivarni

Greiningin er bert ætlað sum ein almenn kunning um viðurskifti, ið kunnu hava áhuga og skal ikki metast sum ráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá upplýsingum, sum eru í greiningini uttan aðra ráðgeving. Vit lata onga váttan ella vissu um rættleikan ella fullkomileikan av upplýsingum, ið eru tiknar við í hesi greiningini.

P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki

Óðinshædd 13
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn

+298 31 47 00

JANUAR@JANUAR.FO
WWW.JANUAR.FO